# Skrivstovufólk

til Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f

## Vit søkja eftir skrivstovufólki at arbeiða 1/2 tíð hjá Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f.

Starvið fevnir um vanligt skrivstovuarbeiðið, herundir eisini at taka sær av bókhaldinum hjá felagnum.

**Vit vænta at tú hevur hesar førleikar:**

- Fyrst og fremst hevur eitt positivt sinnið og góð samstarvsevni.
- Hevur viðkomandi útbúgving, ella royndir innan skrivstovuarbeiðið.
- Hevur royndir innan bókhald. Royndir innan Lundan bókhaldskipanina er ein fyrimunur, men tó ikki ein treyt.
- Hevur góð evnir at samskifta í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum.

Til rættað fólkið bjóða vit eitt avbjóðandi og fjølbroytt starv í eini arkitektafyritøku, sum hevur nógvar spennandi arbeiðsuppgávur.

Løn og setanarviðurskifti verða ásettar í mun til royndir og førleikar.

Umsóknarfreistin er 23. juli 2010 og starvið verður sett skjótast gjørligt.

***Umsóknir skulu stílast til:***
Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f
Landavegur 9
100 Tórshavn
Viðmerkjast: Skrivstovustarv

ella við telduposti til: bn@sna.fo

Um spurningar eru til starvið kann ringjast til Birgir Nielsen á 502030.

LANDAVEGUR 9 · FO-100 TÓRSHAVN · TEL. 35 48 12 · FAX 35 48 10 · SNA@SNA.FO · WWW.SNA.FO

**Selmar Nielsen** Arkitektur Sp/f

Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f er eitt arkitektavirkið í Havn, har 6 arkitektar- og byggifrøðingar starvast. Arkitektavirkið hevur síðstu árini staðið fyri stórum og nýskapandi arkitekta og projekteringsuppgávum í Føroyum, umframt at arkitektavirkið eisini hevur spennandi arbeiðsuppgávur fyri framman.



FAROE DIVE.fo

Kavaraskeið · Kavaratúrar · Søla av kavaraútgerð · Leiga av kavaraútgerð

# KAVARAHJÁLPARASKEIÐ Í AUGUST

Í august bjóðar Faroe Dive skeiðir fyri teimum, ið ynskja at arbeiða sum kavarahjálpara. Talan er førleikagevandi skeið. Skeiðið er í 5 dagar. Á skeiðnum verða nógv ymisk evnir verða viðgjørd, sum t.d. Fyrstuhjálp til kavarar, kavaraástøði, kavaralóggávan, vanligar uppgávur hjá einum vinnukavara v.m.

Eftir at hava staðið skeiðið við nøktandi úrslitið fáa næmingar okkara prógv frá vinnukavaraskúlanum Faroe Dive og kunna søkja um arbeiðsloyvi sum kavarahjálpari frá arbeiðseftirlitinum.

**Luttøkukrav:** Fyrstuhjálparskeið | **Kostnaður:** kr. 5.000,-



Mylnugøta 17 · 700 Klaksvík · Faroe Islands · www.faroedive.fo · faroedive@faroedive.fo · tlf. 218929 / 224224

## Kliniskur sjúkrarøktarserfrøðingur til Bráðdeildina G1

Hevur tú hug at vera við til at mynda eina spennandi og avbjóðandi deild, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her.

Starvið sum kliniskur sjúkrarøktarserfrøðingur á G1 er leyst at søkja. Tað snýr seg um eitt starv á brøki 0,8 ella eftir nærri avtalu, sum er til setan 1. september 2010 í fyribils eitt ár.

Kliniski sjúkrarøktarserfrøðingurin skal í høvuðsheitum taka sær av framhaldandi menning av intensivu deild, viðrakning, bráðmóttøku og skaðastovu. Viðkomandi verður ein partur av starvsfólkahópinum á G1, tó soleiðis, at hon/hann ein part av tíðini arbeiðir burturav við klinisku menningaruppgávunum á deildini. Hetta arbeiði skal í mesta mun útinnast í dagtíð.

**Uppgávur hjá kliniska sjúkrarøktarser frøðinginum:**

- Arbeiða við fakligari menning í tøttum samstarvi við deildarleiðara, varðaleiðara og starvsfólkið á deildini
- Gera ella skipa fyri mannagongdum fyri tey ymsu økini á deildini
- Standa fyri implementering av nýggjum mannagongdum og tryggja, at hesar verða dagførdar
- Fakligur ráðgevi hjá starvsfólkinum
- Undirvísa starvsfólki á deildini, bæði ástøðiliga og í praksis
- Kontaktpersónur hjá starvsfólki á deildini, læknum og øðrum starvsbólkum, tá tað snýr seg um sjúkrarøktarfakligar spurningar á G1
- Kontaktpersónur í samband við konsulentvitjan

**Krøv til umsøkjaran:**

- Hollar kliniskar royndir
- Útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Serútbúgving innan intensiva sjúkrarøkt ella er í gongd við slíka
- Sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og visioner/ur
- Hug og áræði til at menna serøkini á deildini
- Telduførleiki
- Hevur kunnleika til talgilda bókmentaleiting
- Dugir at orða seg á føroyskum
- Góð samstarvsevni

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fyri varadeildarleiðarar

Nærri fæst at vita við at ringja 304500, lokal 5811 til Jórun Højgaard, deildarleiðara, t-post: lsjorho@ls.fo ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Bráðdeplinum, lokal 5102, t-post lsastjo@ls.fo

Umsóknarfreistin er mánadagin 16. august 2010 kl.12.00

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo



## Læknaskrivari til Medisinska depilin

Á Medisinska deplinum er eitt fast fulltíðarstarv leyst at søkja til setan 1. september 2010 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**

- fyriskipa og samskipa arbeiðið í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar
- verða við til at menna Medisinska depilin

**Vit vænta, at tú:**

- hevur góð samstarvsevni
- hevur góðan røkjuskap
- hevur góðan telduførleika
- ert jalig/ur og opin fyri avbjóðingum

**Vit bjóða:**

- eitt starv, har tú sjálv/ur fært ávirkan á títt arbeiði
- møguleikar fyri at menna teg fakliga eftir tørvi
- eitt fjølbroytt arbeiðspláss við ymiskum fakbólkum

**Krøv til umsøkjaran:**

- prógv sum læknaskrivari

**Setanartreytir:**
Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103.

Umsóknarfreistin er 16. august 2010 kl. 12.00

Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo